VIÐMERKINGAR

# Sum millum hamar og ambolt!

**Randi í Jógvansstovu**
*Leirvík*

Eitt val millum pest og kolera, never mind kalla tað hvat tú vilt.

Ein frá náttúruni givin perla liggur her. Góð at heinta, nemm eisini. **Men** vil hon sjálv verða **»heintað«? Nei!** og **»nemm«** er hon í hvussu so er ikki. Hon veit at hon er dýrabar.

Leirvíksbygd hevur fullvæl gjørt sær greitt, at hon hevur stóran týdning í tí stóra spælinum. Takið ikki feil av henni. Tó so eitt av eyðkennum hennara er smædni. Lítllátin og ikki tey stóru armbevegilsini. Soleiðis er hon bara.

Perlan hjá okkum skal ikki verða fjald, tíansheldur ónortin, tá var hon illa farin. Vit vita at jú fleiri fáa part av henni, størri verður hon, størri verður gleðin um hana eisini. Tað vit hava nú er gott, og vit vilja so fegin geva øðrum burturav tí. **Men** tað, sum vit geva, skal vera gott. Sjálvkritikk hava vit, hóast alt.

Vit hava onga ætlan um at leggja snávingarstein fyri norðoyingar, hvørki so ella so. Vit duga eisini væl at síggja, at framtíðar perspektiv er í tí, sum fer fram.

Eitt oyggjaland samantvinnað við góðum samferðslukervi. Utopia? Nei, als ikki. Men ikki fyri einhvønn prís! Framgongdin hevur sín prís, tað vita vit.

**Perlan** hjá okkum er dýrabar, og eigur ikki einans verða gjørt upp í hvat »loysir« seg í **KRÓNUM OG OYRUM**. Hon skal varðveitast við so fáum skeinum sum gjørligt. **Pliiiise?**

# Eivindur og Kirsten í Smiðjuni



*Eivindur í Gongini hevur arbeitt í fjareysturi seinastu 3 árini, og tað setir sín dám á myndirnar*

TÍÐINDASKRIV

Hósdag 18. septembur–sunnudag 28. septembur 2003. 1400 - 1900 hava Kirsten Mørup Jeppesen og Eivindur í Gongini framsýning.

Kirsten og Eivindur gingu saman á Billedskolen á Jagtvejen í 1997 og 1998, og hava havt framsýning saman áður í Smiðjuni og í Danmark.

Kirsten sum er hálvur Kvívíkingur, var í Føroyum í ár 2000 har hon sýndi fram í Smiðjuni, samstundis sum hon málaði vatnslitismyndir við motivum úr Føroyum. Hesi bíløt av føroysku náttúruni góvu Kirsten íblástur til at arbeiða viðari við olju á lørift, tá hon kom aftir til Danmarkar, og er hon nú aftur í Føroyum, og sýnir fram hesar vatnlitsmyndir og oljumálningar.

Eivindur hevur arbeitt í fjareysturi seinastu 3 árini, og hevur ikki sýnt fram í Frøroyum í hesum tíðarskeiðnum. Men nú meinar hann, at áhugin fyri India og fjareysturi er vaksandi eisini her hjá okkum, tí hevur hann valt, at sýna fram myndir, sum hann hevur málað við indiskum motivum, siga tey bæði Kirsten Mørup Jeppesen og Eivindur í Gongini í tíðindaskrivi.

# Lasse Klein: Ein filosofiskur tungvektari

**Sjúrður Skaale**



**Lasse Klein er stigin fram úr fjøld sum ein filosofiskur tungvektari. Útlendskir analytikarar eru heilt hugtiknir av manninum av Saltangará. Tað er ikki at vera fyri, nú Lasse aftur ætlar at yvirtaka Sjálvstýrisflokkin**

Í donsku Weekendavísini (WA) næstsíðsta fríggjadag, er viðtal við Bernard Ingham, sum í 11 ár stóð fyri samskiftinum hjá Thatcher-stjórnini við fjølmiðlarnar.

Ingham, sum ideologiskt stendur ytst á bretska høgravonginum, finst hvassliga at Blair stjórnini fyri at manipulera og stýra teimum politisku tíðindunum.

Ingham sigur m.a. soleiðis í WA: "De (t.e. Blair stjórnin, ss) kom ind med en fantastisk entusiasme, og en overvældende styrke. Og de besluttede at fortsætte på samme måde i regering, som de havde gjort i opposition. Med de samme metoder. Derfor lækkede de alting. Parlamentet får ikke længere tingene at vide først. Regeringen lækker til venligtsindede journalister. Det er mangel på respekt for parlamentet. Det skaber foragt for politik, og det skader journalistik i ekstrem grad. Journalister har måttet finde sig i at blive hængt ud, tyranniseret og undergravet i forhold til redaktører. Beskeden er: Hvis du skriver som vi vil have, får du noget. Hvis ikke er din karriere i fare."

Síðsta fríggjadag hevur Lasse Klein, sum er formaður í Landsfelag Sjálvstýrisfloksins, ein grein Í Fregnum undir heitinum: Ein samgonga á vegamóti. Hann finst hvassliga at stóru samgonguflokkunum fyri at manipulera og stýra teimum politisku tíðindunum.

Klein skrivar m.a. soleiðis í Fregnum: "Teir yvirtóku landsins stýri við eini ótrúligari idealismu fyri skjótt seks árum síðani, og ruddaðu alt framman fyri sær við einari styrki sum ikki var sædd áður, og teir samtyktu at halda fram í landsstýrinum á sama hátt sum teir høvdu gjørt í andstøðu. Við somu atferð. Hetta er orsøkin til, at teir leka øll tíðindi. Løgtingið fær ikki longur boðskapin um málsviðgerðirnar fyrst. Landsstýrismenn leka til góðu vinir sínar í fjølmiðlaheiminum. Eingin virðing er fyri løgtinginum longur. Hesin arbeiðsháttur skapar vanvirðing fyri politiska arbeiðinum, og skaðar arbeiðið hjá journalistum í stóran mun. Fjølmiðlafólk hava verið noydd at funnið seg í at verða hongd út, kúgað og trælkað. Boðini eru greið: skrivar tú sum vit vilja hava, so ført tú nakað. Um ikki, so er tín karriera í vanda."

**Almennur partapolitikkur**

Ingham átalar eisini, at almennir embætismenn verða settir at reka partapolitikk. Soleiðis var ikki fyrr, sigur hann við WA: "Vi skulle tjene regeringen - ikke et politisk parti. Vi skulle være parat til at tjene enhver regering, der kom til. Og vi måtte ikke bruge skatteyderpenge til partipolitiske formål. Man kan kun bruge skatteyderpenge til at forklare, hvad regeringens politik er. Ikke på at fortælle, hvor fantastisk regeringen er. Det bør ikke være vanskeligt at skelne".

Á sama hátt átalar Klein, at embætismenn verða settir at reka partapolitikk. Soleiðis var ikki fyrr, skrivar hann, og minnist embætismenn í gomlum døgum: "Teir skuldu tæna landsstýrinum - ikki einum politiskum flokki. Teir skuldu verða til reiðar at tæna einum og hvørjum landsstýri, sum kom til aftaná eitt val, og teir skulu ansa væl eftir ikki at brúka skattaborgarans pening til flokspolitiskt endamál. Til ber bert at brúka skattaborgarans pening til at greiða frá, hvat endamál er við landsstýrisins politikki. Ikki at greiða frá hvussu ótrúliga góð ein landsstýrissamgonga er. Tað átti ikki at verið trupult at skilt", skrivar Lasse í Fregnum.

**Eingin ideologi**

Bernard Ingham heldur, at Tony Blair hevur vrakað hugsjónina hjá Labourflokkinum: "Han har ikke nogen ideologi. Han har begravet Labours ideologi. Den var måske gammeldags, men den var i det mindst en ideologi - en overbevisning", sigur Ingham við WA.

Lasse Klein heldur, at støðan er líka álvarsom í Føroyum: "Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hava feiað sítt politiska hugsjónarstøðið inn undir gólvteppið. Tær trongdu møguliga til endurnýggingar, men tær vóru hóast alt eitt politiskt hugsjónarstøði - ein trúgv, ein sannføring", skrivar Lasse í Fregnum.

Ingham heldur, at sjálvt demokratiið í Bretlandi er í vanda: "Regeringen tror kun på manipulation. Det har intet med demokrati at gøre. Det eneste, der minder om demokrati, er, at man bliver valgt. Men det gjorte Hitler også".

Lasse heldur, at støðan er tann sama í Føroyum. Í Fregnum skrivar hann: "Sum støðan er í løtuni so trúgva Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin bert uppá sjúkliga handfaring av politiskum málum. Hetta hevur einki sum helst við demokrati at gera. Tað einasta sum yvirhøvur minnir um demokrati er, at val er av og á, og helst skal talan verða um afturval. Somu hugsan hevði Hitler eisini."

**Filosoffurin Klein**

Tann, sum lesur donsk bløð, leggur til merkis, at fólk, sum skriva Skáan í Dimmalætting leygardagar, viðhvørt stjala sínar greinar. Tey umseta okkurt úr Politiken ella Berlingske, og selja tað síðani til Dimmu sum um tey hava skrivað tað sjálv.

Kann tað hugsast, at landsformaðurin í landsfelag Sjálvstýrisfloksins, Lasse Klein, veruliga hevur stolið tilfar úr Weekendavísini, og prenta tað við sínum egna navnið undir?

Kann tað hugsast, at Lasse Klein, fyri at síggja klókur og lærdur út, bara hevur gjørt orðini hjá einum klókum og lærdum manni til síni? At hann pyntar seg við læntum fjarðum? At hann slett ikki hevur gjørt hasa analysuna, sum hann læt prentað í Fregnum?

Sjálvsagt ikki. Tílíkt kundi ein reiðiligur maður sum Klein ikki droymt um.

Orsøkin til, at Lasse orð fyri orð sigur tað sama um Tjóðveldis- og Fólkaflokkin, sum Ingham sigur um Labour, má vera ein onnur: Ingham má hava tosað við Lassa áðrenn hann tosaði við Weekendavísina!

Tað vísir bara hvussu høgt í metum sum politiskur filosoffur Lasse er uttanlands. Og hvat vit føroyingar kunnu vænta okkum, nú Lasse Klein aftur ætlar at yvirtaka Sjálvstýrisflokkin.

# Til gongu eftir gomlum gøtum

TÍÐINDASKRIV

Ferðaráð Føroya hevur givið ein faldara út, sum lýsir 14 ymsiskar gongutúrar. Undantikið tvær ferðaleiðir, fylgja túrarnir okkara aldargomlu bygdagøtum.

Ferðaráðið hevur lagt kommununum lag á við skeltingini og merkingini av gomlu bygdargøtunum. Hetta er millum annað gjørt við einum vegleiðandi faldara, sum varð sendur út til allar kommunur, kunningarstovur og bygdasøvn sum fyrireiking til hendan faldaran um gomlu gøturnar.

- Til mikla gleði eru ávísar kommunur nú farnar undir eina miðvísa skelting av bygdagøtum og sum dømi kunnu eitt nú gøturnar Hvalvík-Vestmanna og Lamba-Rituvík nevnast. Her eru allir varðar eftirhugdir og nýggj bygdagøtuskelti bíløgd. Ferðaráðið hevur áður verið í samstarvi um skelting á bygdagøtum, men verandi arbeiði tekur støði í teirri nýggju sniðhandbókini, sum Tórálvur Weihe, arkitektur gjørdi fyri Ferðaráðið fyrr í vár, sigur Ferðaráðið í tíðindaskrivi.

Nógvar áhugaverdar søgur eru knýttar at varðagøtunum og í tí sambandi er roynt at knýta ymsar sagnir og aðra áhugaverda upplýsing at túrfrá-greiðingini. Gongufaldarin er tøkur í enskari og danskari útgávu á komandi ferðavinnuportalinum www.visit-faroeislands.com undir 'Inspiration', har hin nýggji fuglafaldarin eisini er tøkur. Randi Meitil hevur skrivaði tekstin og ReproZ stóð fyri umbrótting.

Teksturin er eisini tøkur á føroyskum og verður í næstum tøkur á øllum kunningarstovunum kring landi.



# Bygdasálin í Hósvík er knúst



*Mikkjal Hansen heldur tað vera undarligt, at bygdarráðið í Hósvík, sum ikki vildi boyggja seg fyri einum meiriluta uppá 10 fólk, sum vóru ímóti, 6. mai, nú vil eftirlíka einum teprum meiriluta, sum bert telir 5 fólk. - Eg dugi ikki at ímynda mær, at landsstýrismaðurin, sum skal góðkenna hetta, fer at gera tað, sigur hann*

**- Hósvík hevur verið ein fyrimynd í Sundalagnum sum ein bygd við góðum samanhaldi, men stríðið um samanlegging, hevur knúst bygdasálina, sum hevur so stóran týdning fyri eina bygd. Split er sátt í, og bygdin verður ikki hin sama aftur, sigur Mikkjal Hansen**

FÓLKAATKVØÐA

*Vilmund Jacobsen*

Tað var ein tepur meiriluti á fólkaatkvøðuni í Hósvík leygardagin fyri samanlegging við komandi Sunda kommunu. Tá uppteljingin var liðug, høvdu 88 hósvíkingar atkvøtt fyri samanlegging og 83 høvdu atkvøtt ímóti. Á teirri fyrru fólkaatkvøðuni, sum var 6. mai, atkvøddu 71 fyri og 81 ímóti.

Í samrøðu við Útvarpið segði bygdarráðsformaðurin, Jógvan Mørkøre, at bygdarráðið fer at taka úrslitið til eftirtektar.

## Undantaksstøða

Mikkal Hansen, sum áður hevur sitið í bygdarráðnum í Hósvík, er ein teirra, sum alment hevur givið til kennar, at hann er ímóti, at Hósvík fer upp í komandi Sunda kommunu beint nú. Hann heldur, at tíðin er við hósvíkingum í hesum máli og heldur tað vera óðamannaverk – við einum so teprum meiriluta - at tvinga fólk uppí eina komandi Sunda kommunu, haðani ikki slepst burtur úr aftur.

Hann heldur eisini, at framferðin hjá einum parti av fólkinum í Hósvík og bygdarráðnum í hesum máli er púrasta burtur við.

- Fólkaatkvøðan, 6. mai, var erlig, tí hon var sambært teirri avtalu, sum var ímillum kommunurnar um at halda fólkaatkvøðu samstundis. Fyrru ferðina var málið ikki ein spurningur um lív ella deyð, men um samanlegging ella ikki. Hesaferð hava fólk nærmast ført seg fram, sum um Hósvík var í undantalsstøðu, tí málið fall á fólkaatkvøðuni seinast.

Mikkjal sigur, at sjálvur var hann ikki so hart ímóti samanlegging, at hann hevði farið runt í bygdini at savnað inn undirskriftir, um ein meiriluti av fólkinum avgjørdi at fara upp í Sunda kommunu.

- Men soleiðis, sum málið seinni hevur tikið seg upp, haldi eg, at framferðin er púrasta forkastilig og andstyggilig. Eftir at úrslitið fyrilág, fóru fólk runt í bygdini at savna inn undirskriftir, sum um talan var um undantaksstøðu.

Hann vísir á, at tað er ikki loyvt at ganga runt og selja uttan við loyvi, og hann heldur ikki, at tað skuldi verið loyvt at gingið runt og savnað inn undirskriftir á henda hátt, har fólk verða biðin um at skriva undir, tí nú vanta bara so ella so fáar undirskriftir í, at nóg mikið er í skjáttuni…

## Broytingaruppskot

Mikkjal sigur, at í brævinum, sum fólk skrivaðu undir, varð heitt á bygdarráðið um at leggja saman við komandi Sunda kommunu. Brævið legði ikki upp til eina nýggja fólkaatkvøðu um málið.

- Hóast bygdarráðslimir skrivaðu undir brævið, sum varð lagt fyri bygdarráðið, so samtyktu somu bygdarráðslimir eitt broytingaruppskot sum var at hava eina nýggja fólkaatkvøðu. Tað merkir, at teir undirskrivaðu eitt – og samtyktu eitt annað.

Hann leggur dent á, at fólkaatvøðan, 6. mai, var hildin sambært tí leisti, sum kommunurnar høvdu samtykt.

- Men tá ið úrslitið ikki gjørdist tað, sum flestu kommunustýrislimir ynsktu, varð bara lagt upp til eina nýggja fólkaatkvøðu.

Mikkjali heldur, at bygdarráðsformaðurin í Hósvík, Jógvan Mørkøre, var skjótur at skíra tey, sum ikki vóru fyri samanlegging, afturhaldssinnaði.

- Ja, eg vil siga, at hesi vórðu beinleiðis niðurgjørd sum fávitskut, sigur hann.

Hann heldur annars ikki, at alt er rætt, sum borið er fram av Jógvani og bygdarráðnum um viðurskiftini hjá Hósvíkar kommunu uttanfyri, men í samstarvi, við eina komandi Sunda kommunu.

- Eg ivist ikki í, at vit ein dag høvdu komið uppí Sunda kommunu kortini, men vit, sum ikki taka undir við hesum nú, halda ikki, at tíðin er búgvin. Sum er, hava vit samstarv norðureftir á fleiri økjum, og tað vildi verið ógvuliga undarligt, um kommunurnar norðanfyri fóru at sekta okkum, sum ein komandi samstarvspart – bara tí, at fólk ikki eru samd um, hvørt tíðin til samanlegging er búgvin.

## Fólk angraðu…

Bygdarráðið við Jógvani Mørkøre á odda hevur sagt, at nógv fólk angraðu, at tey ikki tóku undir við samanleggingini á fyrru fólkaatkvøðuni.

- Men hetta er ikki rætt, tí hóast tepur meiriluti nú var fyri samanlegging, vóru eisini fleiri nei-atkvøður hesaferð enn seinast.

Mikkjal vísir á, at eini 95-97 fólk skrivaðu undir áheitanina á Hósvíkar kommunu um at fara uppí komandi Sunda kommunu, men bert 88 atkvøddu fyri á valinum leygardagin.

- Eg haldi, tað er langt úti, at fólk, sum skrivaðu undir hesa áheitan, ikki fóru á val, sigur hann.

Hann heldur tað annars vera undarligt, at bygdarráðið, sum ikki vildi boyggja seg fyri einum meiriluta uppá 10 fólk, sum vóru ímóti, 6. mai, nú vil eftirlíka einum teprum meiriluta, sum bert telir 5 fólk.

- Eg dugi ikki at ímynda mær, at landsstýrismaðurin, sum skal góðkenna hetta, fer at gera tað, sigur Mikkjal.

Hann stúrir annars fyri, at tað stríð, sum nú hevur tikið seg upp, fer at knúsa fyrimyndarliga samanhaldið sum hevur verið millum bygdarfólkið.

- Eingin tekur okkum hósvíkingar fyri fult longur, soleiðis sum hetta mál er viðfarið, og eg stúri fyri, at handfaringin av hesum máli fer at sáa split í bygdina. Bygdarsálin er knúst, sigur Mikkjal Hansen at enda.

*Framhald av síðu 3*

gekk fram við og hugdi hin vegin, vildi slett ikki hjálpa honum. Tað eru framvegis fleiri í halda at okkurt skeivt er komið fyri í tekstinum, at tað heldur var ein fariseari, sum kom framvið.

Nógv fólk var í Glyvra Kirkju. Umframt teir gott 100 innbodnu gestirnar var kirkjuliðið fjølment, vit hoyrdu rungandi sang, vakran kórsang og floytuspæl.

## Framúr døgurði

Undirritaði hevur sjálvur starvast í Sjómanskirkjuni og var í hesum sambandið boðin við til hátíðarhald og døgurða. Og eg hevði glett meg nógv til júst hendan døgurða, tí hann hevur verið væl og virðiliga viðgjørdur í bløðunum seinastu tíðina. Betri reklama fyri ein døgurða enn skrivingin hjá Ólavi Petersen, kann neyvan hugsast, tung byrða lá á kokkinum á Runavíkar Sjómansheimi sunnudagin.

Men sum ein strika í allari rokningini, kom mentamálaráðharrin seinastu mánaðarnar, Høgni Hoydal, í bløðunum í vikuskiftinum og segði, at skrivingin hjá Ólavi Petersen var ikki bein. Rokningin fyri døgurðan á Sjómansheiminum varð goldin av innsavnaðum peningi, sum sjómanskirkjan hevði fingið frá talvugongd í kirkjuni og frá fíggjarligum stuðlum hjá Sjómanskirkjuni annars, frá manningarfeløgum og øðrum og slett ikki úr landskassanum.

Og døgurðin var ein veldug íløga hjá Føroysku Sjómanskirkjuni. Tí so hvørt sum vit mettaðust, so byrjaðu talurnar, og tað vóru føgur orð og lyfti um fíggjarligan styrk í tey flestu bóru fram, av teimum sum høvdu møguleika at skaffa pening. Umboð vóru fyri tey 60 kirkjuráðini í landinum og tey eru til dystin fús at lata avlopspening til Sjómanskirkjuna, tað eru manningarfeløgini eisini og onnur við.

Og hvat fingu vit so til døgurða. Lætt saltaðar rækjur, sum einaferð hava svomið á havsins botni yvir á Flemmish Cap, fiskaðar av føroyingum, blandaðar upp í ljósareyða dressing, fínt kryddað við kryddurtum uttan úr heimi, ein dressing, sum hevði sín uppruna sum nýmjólk í onkrum føroyskum fjósi, áðrenn hon bleiv yst á Mjólkarvirki Búnaðarmanna. Rækjur og dressing lógu á fрískum grønmeti og asparges. Og so høvuðsrætturin. Rund, dillandi, tilpass feit og trivalig rullisteik við sviskum og gularótum inni í, væl og brún stokt og lekkur. Akkurát sum ein rullusteik, ið man bara fær á bygd, tíverri, eigur at vera. Og sósin, lættliga søt, brún, væl tilsmakkað og leskilig. Og omaná, ja Ólavur, hetta var super :O)). Ein alvorlig triflla við budingskremi, frukt, fløta og sjokolátu omaná.

## Fleiri sjómansprestar

Tað kom týðuliga fram undir borðhaldinum, at sjómanspresturin í Hull ikki fór at vera tann seinasti og einasti. Uttan at vera ítøkiligar, so bendu talurnar á, at vit fóru at fáa sjómansprestar aðra staðir eisini. Og tað fer helst at merkja, at at ein sjómansprestur fer at arbeiða onkunstaðni millum Rotterdam og Hongkong, á leiðini har bingjuskipini røkja sambandið millum Europa og Fjareystur. Danska Sjómanskirkjan hevur nú eisini fingið fótin fastan í suðurspanska býnum Algacieras, og har hevði ein føroyskur sjómansprestur hitt føroyingar dagliga.

Komandi landsstýriskvinnan í mentamálum, Anita á Fríðriksmørk er farin undir venjingarnar, áðrenn hon tekur við í hesi vikuni. Hon tók orðið á Sjómansheiminum í Runavík og tað er lítil ivi um, at hon verður ein góður stuðul undir Sjómanskirkjuni. Hon hevði føgur orð at bera tí arbeiði sum verður gjørt í Sjómanskirkjuni.

Sum er, so er bara Hjørdis úti fyri Føroysku Sjómanskirkjuna, men framtíðin hevur avbjóðingar. Samstarvið við Donsku Sjómannskirkjuna heldur fram, eisini eftir at hon verður samanløgd við Dansk Kirke i Udlandet á nýggjárinum og júst hendan samanlegging fer eisini at skapa nýggjar møguleikar hjá tí føroysku sjómanskirkjuni at koma í samband við føroyingar uttanlands.

Mánadagin var nevndin fyri sjómanskirkjuna og útlendsku gestirnir á ferð í Norðoyggjunum. Týsdagin fóru Hjørdis við familju, aðalskrivaðin í donsku sjómanskirkjuni Ronald Peter-sen og konan Inga, og Solveig og Henning Bøges-vang aftur til arbeiðis úti í heimi.